HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

Tórshavn, hin 24. september 2009
Málnr.: 09-200800457-7

**Víðvíkjandi: Tveir tíðindastubbar í.s.v. fletting og burturbeining av leivdum**

**Tíðindabrot 1:**

# Leivdir frá fletting eiga at verða burturbeindar í bingju, ætlað til hetta endamál

Vil, vembur, kleyvar og aðrar leivdir frá fletting, sum ikki verða gagnnýtt, mugu burturbeinast á skynsaman hátt. Leivdir frá fletting eiga ikki at verða beindar í á, fjøru ella haga. Henda dálking av umhvørvinum kann ofta síggja ótespilig út, geva ringan lukt og verða atvold til smittu.

# Serstakar bingjur til lívrunnið burturkast

Heitt verður á fólk um at beina tær leivdir frá fletting og slakti, ið ikki verða gagnnýttar, burtur í tær bingjur, sum kommunurnar hava standandi til hetta endamál. Í hesar bingjur kann eisini annað lívrunnið tilfar latast í, tað veri seg slógv, fjaðrar, og annað.

Ikki er loyvt at niðurgrava leivdir frá flettingini.

# Fyribyrgið spjaðing av djórasjúkum, t.d. ridluskriði og sníkar (parasittar)

**Kemur seyður frá fremmandari bygd ella er undantak givið av Heilsufrøðiligu starvsstovuni fyri flyting av seyði ímillum oyggjar, skulu allar leivdir - herundir gor o.t. - beinleiðis til kommunalu móttøkuskipanina í tøttum ílati og verða vardar av sterkum posa soleiðis, at einki setir frá hesum leivdum**. Seyðagøgn ella leivdir annars mugu ikki nýtast sum føði hjá hundum ella kettum, uttan at hetta frammanundan er væl kókað. Lívsleiðin hjá fleiri sníkum er soleiðis, at teir saktans kunnu ferðast frá djóri til djór, og kunnu ávís sløg eisini raka fólk, umvegis matin.

**Tíðindabrot 2:**

# Reinføri er alneyðugt fyrivarni móti smittu og mateitran

Alt, sum kemur at kjøtinum, skal vera reint og so frítt fyri sjúkuelvandi bakteriur, sum gjørligt. Húsdjór og annar fenaður, fiskur, grind ella líknandi má ikki koma at kjøtinum. Tað ræður um, at kjøtið verður viðgjørt á ein slíkan hátt, at sjúkuelvandi bakteriurnar ikki koma at og nørast. Tí má eisini ansast væl eftir, tá ið kjøtið verður hongt upp.

Flettarar og hjálparfólk eiga eisini at vanda sær um tað persónliga reinføri, vera í reinum arbeiðsbúna og tíðum vaska sær um hendurnar. Øll útgerð, sosum knívar og íløt, eigur at verða væl reingjørd, áðrenn byrjað verður at fletta, og haldast rein ígjøgnum dagin.

Undir flettingini skal ansast eftir, at kjøtið ikki verður dálkað av gori, ull og skarni. Krovið eigur at verða hongt í hjallin, sum skjótast, so tað kólnar. Luft skal sleppa væl at tí. Kjøt skal goymast kalt og eigur ikki at verða hongt upp at turka ta tíðina, tá ið tað er lýtt í veðrinum.

Yvirhøvur eigur matur, sum ikki luktar ella sær út, sum hann skal, at verða burturbeindur.

Sjúkur seyður skal ikki nýtast til matna. Frárátt verður fólki at eta merg og heilar.